# Programleiðari til Heilbrigdi

## Viðgerðarheimið Heilbrigdi á Velbastað søkir eftir programleiðara

**Um Heilbrigdi:**
Heilbrigdi er viðgerðarheim, sum síðan 1986 hevur viðgjørt rúsevnismisnýtarar sambært 12 stiga skránni hjá AA – eisini kallað Minnesota viðgerðin.

**Lýsing:**

Sóknast verður eftir eldhugaðum fólki at leiða og standa á odda fyri viðgerðini á stovninum. Programleiðarin skal millum annað standa fyri grundviðgerðini, eftirviðgerðini, skeiðum fyri familju og avvarðandi. Programleiðarin eigur í øllum lutum at vera fyrimynd fyri hina ráðgevararnar.

**Starvið:**

Høvuðsuppgávurnar hjá programleiðaranum eru m.a.:

- hava ábyrgd av arbeiðinum hjá ráðgevunum og syrgja fyri, at allar reglur í viðgerðini verða hildnar
- skipa fyri neyðugari útbúgving, eftirútbúgving og førleikamenning eftir Minnesota leistinum til viðgerðarnar og til starvsfólkið annars
- tilrættaleggjan av arbeiðsvegleiðingum til starvsfólki og dagligu skránni av viðgerðini
- føra gerðarbók, soleiðis at viðgerðin verður skjalfest

**Vit vænta, at umsøkjarin:**

- hevur hug og hegni at leiða og er sjónlig/ur í leiðarastarvinum
- er tænastusinnaður, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til samstarv við bæði starvsfelagar, misnýtarar og hevur góð tvørfaklig samstarvsevni
- hevur innlit í virksemi á misnýtsluøkinum
- dámar avbjóðingar og hevur vilja og evni at royna nýggjar leiðir
- hevur viðkomandi arbeiðsroyndir, førleikar og møguliga útbúgving í mun til misnýtslu og sjúklingar annars
- hevur fakligan áhuga og vísir ábyrgd fyri egnari fakligari og persónligari menning
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á stovninum
- dámar avbjóðingar og hevur vilja og evnir at royna nýggjar leiðir
- hevur koyrikort
- reina revsiváttan

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi starv við sjálvstøðugum og avbjóðandi uppgávum. Arbeiðið á einum høgum fakligum støði og góðar møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Talan er um fulltíðarstarv. Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið

Starvið verður lýst til setanar frá 1. januar 2024

Heilbrigdi skilar sær rætt til at søkja av nýggjum, um mett verður at skikkaður umsøkjari ikki søkir.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi
Norðuri á Heyggi 3 - 176 Velbastaður
Telefon (+298) 32 80 55
Email: heilbrigdi@heilbrigdi.fo

Umsókn verður at senda til:

Viðgerðarheimið Heilbrigdi á Velbastað
Norðuri á Heyggi 3
FO-176 Velbastaður
Att.: Annika Holm

ella teldupost: annika@heilbrigdi.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi seinast 26. november 2023

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Anniku Holm, stovnsleiðara á telefon 580379